# Javnaðarflokkurin valevnisfund

**Um vikuskiftið hevði Javnaðarflokkurin valevnisfund í Havnini**

VAL
*Ingrid Bjarnastein*

Javnaðarflokkurin hevði um vikuskiftið valevnisfund. Á fundinum áttu øll umboð í øllum valdømunum at verða umboðað.

Valevnislistin fyri Javnaðarflokkin til komandi løgtingsval sær soleiðis út:

**Eysturoyar valdømi:**
William Max Hansen,
Sunleiv Højgaard,
Sylverius Jacobsen,
Artur Johansen,
Randi í Jógvanstovu,
Katrin Jønsson,
Andreas Petersen og
Dan Reinert Petersen.

**Vága valdømi:**
Kristoffur Gaardlykke,
Malan Helgadóttir,
Rasmus Niclassen og
Sigfríður Olsen.

**Sandoyar valdømi:**
Eyðstein Dalsgaard,
Tummas Frank Joensen,
Gerhard Lognberg og
Birgir Mohr.

**Suðuroyar valdømi:**
Jóannes Eidesgaard,
Rúni Lisberg,
Sverre Midjord,
Jastrid Nielsen,
Henrik Old,
Eliesar Poulsen og
Mikkjal Sørensen.

**Norðstreymoyar valdømi:**
Soffi Egholm,
Gunnvá Mortensen,
Hans Jákup Simonsen
og Hans Pauli Strøm.

**Suðurstreymoyar valdømi:**
Tummas Arabo,
Bergur Dam,
Eyðólv Dimon,
Katrin D. Jakobsen,
Elin Lindenskov,
Kristian Magnussen,
Jan Midjord,
Bartal Nolsøe Poulsen,
Kári Petersen,
Hendrik Thomsen og
Joan Ziskason.

**Norðoyar valdømi:**
Kaj Boetius,
Vilhelm Johannesen,
Torleif Sigurðsson,
Jógvan Páll Poulsen,
Jákup á Fløtti Jacobsen,
Leif Waag Høgnesen og
Mamy Dahl Sørensen.



*Um vikuskiftið var valevnisfundur hjá Javnaðarflokkinum hildin í Havnini*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Hvør fuglur sang við sínum nevi

**Fríggjadagin var móttøka í dagstovninum í Øsknagerði í Havn. Nógv spennandi var á skránni, og heilt fitt av fólki var komið saman**

MÓTTØKA
*Ingrid Bjarnastein*

Í sambandi við, at dagstovnurin í Øksnagerði hevur fingið eina nýggja stovu, varð bjóðað til móttøku fríggjadagin. Dagstovnurin lat upp fyri umleið hálvum ári síðani, og nú er fjórða stovan klár at taka í nýtslu.

Heilt fitt av fólki var komið saman seinnapartin fríggjadagin. Jan Christiansen, borgarstjóri, bjóðaði vælkomin og síðani fór Terji Rasmussen á pallin at syngja eina løtu saman við børnunum. Børnini vóru røsk at syngja við. Formaðurin í mentamálanevndini og arkitekturin fluttu eisini fram røðu, og til endans fór Terji aftur á pallin at syngja eina løtu afturat.



*Terji Rasmussen sang um kettlingarnar saman við børnunum til móttøku á dagstovninum í Øksnagerði fríggjadagin seinnapartin*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Eindargjaldið:

# Ikki ráð til avloysarar

**Á Sankta Josefs Barnagarði eru tey glað fyri eindargjaldið, í øllum førum higartil. Einasti trupulleikin er, at ráð er ikki avloysarar**

EINDARGJALD
*Ingrid Bjarnastein*

– Eindargjaldið riggar fínt, og vit eru glað fyri tað, sigur Louisa Smetz, leiðari á Sankta Josefs Barnagarði.

Barnagarðarnir fáa nú eina fíggjarveitan fyri hvørt árið. Tað, sum ikki verður brúkt verður flutt yvir til næsta ár. Hetta vil siga, at um peningur loypur av, so fellur hann ikki aftur til kommununa, men til barnagarðin sjálvan, og fíggjarveitanin árið eftir minkar tó heldur ikki tilsvarandi.

Sankta Josefs Barnagarður er elsti barnagarður í kommununi, og siga tey seg klára seg fínt fyri fíggjarveitingina. Av tí, at barnagarðurin er so gamal, so krevur hann kanska eitt sindur meira í viðlíkahaldi enn aðrir barnagarðar, men sigur Louisa, at hetta er ikki nakar trupulleiki.

– Vit gera eitt sindur hvørt árið, og um tú brúkar peningin á ein skilagóðan hátt, so er ikki nakar trupulleiki at viðlíkahalda ein gamlan barnagarð. Einasti vansin er, at vit hava ikki ráð til avloysarar, men tað hava vit sum so ongantíð havt. Men um vit skulu hava avloysarar fyri tær longu sjúkralegurnar, so kunnu vit søkja um at fáa endurgjald frá kommununi, og haðani kunnu vit so fáa 70% afturgoldið, greiðir Louisa Smetz frá.

Men higartil hava ongir trupulleikar stungið seg upp viðvíkjandi eindargjaldinum, so á Sankta Josefs Barnagarði í Havn eru tey væl nøgd.



*Louisa Smetz sigur, at á Sankta Josefs Barnagarði riggar tað fínt við einum eindargjaldi*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# ítróttur

Nr. 54 • týsdagur • 19. mars 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Í dag verður venjarin egg ella ungi



*– Tað, sum er sera týdningarmikið nú, er, at fundurin týsdagin finnur fram til, hvussu tað skal vera við venjaranum, sum vit higartil hava samráðst við, sigur formaðurin í Fótbóltssambandinum*

**Sambært Dániali Andreasen, formanni í FSF, verður avgerð tikin á nevndarfundi í dag, um sáttmáli skal skrivast við tann danska venjaran, sum FSF leingi hevur samráðst við**

LANDSLIÐSVENJARIN
*Jóannes Hansen*

Nevndin í Fótbóltssambandi Føroya fer á nevndarfundi seinnapartin í dag at taka støðu til, um sáttmáli skal skrivast við tann venjaran, sum teir hava havt samband og samráðst við síðani síðst í januar.

Dániel Andreasen, formaður í Fótbóltssambandi Føroya, sigur, at talan er um ein danskan venjara. Hann vil ikki siga, hvønn venjara talan er um.

– Vit hava samráðst við henda venjaran, og vit kenna treytirnar, sum vit kunnu fáa hann fyri. Á fundinum seinnapartin týsdagin er ætlanin, at nevndin skal taka støðu, um vit skulu skriva undir eina avtalu ella ikki, sigur FSF formaðurin.

Dánial Andreasen sigur, at uppleggið, sum liggur á borðinum, er, at sáttmáli skal gerast við ein venjara, sum skal vera í fulltíðarstarvi hjá Fótbóltssambandinum. Allan Simonsen var í parttíðarstarvi. Umframt at vera landsliðsvenjari arbeiddi hann í klædnafyritøkuni, sum hann átti saman við øðrum. Tann venjarin, sum FSF hevur samráðst við, skal vera í fulltíðar starvi hjá FSF – um sáttmáli verður skrivaður við hann.

– Eftir at vit hava samráðst við venjaran í fleiri vikur, og tá vit kenna treytirnar, sum vit skulu samstarva undir, so er bara eftir at taka eina støðu, og tað mugu vit gera nú. Tað ber ikki til, at óvissa skal valda um tann spurningin meiri, sigur nýggi FSF bossurin.

Og hvat mælir tú til?

– Longu undan aðalfundinum varð hetta málið viðgjørt. Tá varð mett, at tað var ikki rætt, at ein fráfarandi nevnd setti landsliðsvenjaran. Síðani aðalfundin hava nevndarlimirnir havt møguleika at seta seg inn í málið, sum vit nú halda er búgvið at taka støðu til. Tað verður lagt á borðið púra opið, og so er tað upp til nevndina at taka støðu.

*Hvussu verður við venjaranum, um tann, sum tit hava samráðst við, ikki verður settur?*

– So er talan um eina nýggja støðu. Tann støðan verður, at tað heldur enn at seta venjara í fulltíðarstarv verður hildið fram við einum venjara undir somu treytum, sum teimum sum vóru galdandi, tá Allan Simonsen var venjari.

*Skulu tit so undir at kanna marknaðin av nýggjum?*

– Tað, sum er sera týdningarmikið nú, er, at fundurin týsdagin finnur fram til, hvussu tað skal vera við venjaranum, sum vit higartil hava samráðst við. Tað hevur skund. Um nevndin kemur til ta støðu, at tað ikki er ráðiligt at seta venjara í fulltíðarstarv, so mugu vit arbeiða út frá tí. Tað hevur ikki so øgiligan skund. Fyrstu undankappingardystirnir eru á skránni í september. Sjálvandi er tað rætt at seta ein venjara so skjótt, sum tað ber til, men eg haldi ikki, at vit eru undir trýsti – burtursæð frá at vit skulu finna fram til, hvussu tað skal vera við venjaranum, sum vit higartil hava samráðst við.

## Fleiri eru áhugaðir

Dánial Andreasen sigur, at tað eru fleiri venjarar, sum hava sett seg í samband við Fótbóltssambandið, tí teir hava verið áhugaðir í venjarastarvinum:

– Umframt úr Danmark hava vit eitt nú havt samband við venjarar úr Hollandi og Brasilia. Eg rokni ikki við, at tað er nakar trupulleiki at finna ein venjara. Men, sum eg segði, so verður neyvan talan um venjara fulla tíð, um vit ikki seta tann, sum vit hava samráðst við.

Dánial Andreasen ásannar, at Fótbóltssambandið er ikki so væl fyri fíggjarliga, at tað ikki skal hugsast um tann spurningin, tá venjarin skal setast.

– Á fundinum týsdagin fara vit eisini at viðgera fíggjarætlanina fyri í ár. Sum kunnugt hava vit tey bæði seinastu árini havt rakstrarhall. Í fjør var tað omanfyri hálva aðru millión. Vit stremba eftir at avmarka hallið so nógv, sum tað ber til, men tað ber ikki til við sama virksemi, sum vit hava havt, at fáa javnvág í 2002. Hallið verður minni, enn tað var, men talan verður framvegis um hall. Hvussu stórt tað verður er m. a. treytað av, hvussu tað verður við venjaranum.

Hetta segði Dánial Andreasen fyrrapartin í gjár. Nevndarfundurin í Fótbóltssambandinum verður seinnapartin í dag, og vit fara í blaðnum mikudagin at venda aftur til venjaraspurningin.